# Burðardygg menning í okkara kommunu

## Eitt amboð at skipa arbeiðið við burðardyggari menning í kommununi



# Innihald


| | |
|---|---|
| Burðardygg menning í okkara kommunu? | 3 |
| Arbeiðsætlan | 6 |
| Uppskot til innsatsøki | 7 |
| Arbeiðsbólkurin | 8 |
| Arbeiðsleistur, arbeiðsbólkur | 9 |
| Útgávutekstur | 10 |
| Fundir, uppskot til tíðarætlan | 11 |


**Um Agenda 21 stovuna**
Agenda 21 Stovan er verkætlan hjá Føroya Kommunufelag og er virksemið á Stovuni fíggjað av Innlendismálaráðnum og kommununum í felag. Stovan arbeiðir við at seta í verk og stuðla lokalum Agenda 21 tiltøkum í kommununum. Harumframt skipar Stovan fyri kunning um burðardygga menning og Agenda 21 kring landið.


| | |
|---|---|
| Útgevari | Agenda 21 Stovan 2007 |
| Lagt til rættis | Bergmann Finnsson, ráðgevi |
| Viðmerkingar | Sámal Matras Kristiansen |
| Tekningar | Janus D Guttesen, illustrator |
| Prentgerð og prent | SOZO prepress, www.sozo.fo |
| Pappír | Prentað á 100% svanagóðkent endurnýtslupappír |



# Burðardygg menning í okkara kommunu?

Ein arbeiðsbólkur í Sandavágs kommunu fór í 2006 í gongd við eina royndarverkætlan fyri burðardygga menning í kommununi. Hendan royndarverkætlan heldur fram til 2010.

Arbeiðsbólkurin er mannaður við umboðum úr kommununi og Agenda 21 Stovuni. Agenda 21 Stovan hevur við arbeiðnum uppbygt eina holla vitan um hvussu tílíkt arbeiði kann tillagast til smærri og miðalstórar kommunur í Føroyum.

Í hesum bóklinginum verður hendan vitanin hagreidd í einum formi, ið vónandi kann kveikja hugin at fara í gongd við líknandi verkætlanir í øðrum kommunum. Hesin bóklingur er skipaður sum ítøkiligir leistir, ið kunnu nýtast í verki.




**Endamálið við leistinum**
Endamálið við leistunum er at leggja lunnar undir eitt skipað arbeiði fyri burðardygga menning í kommununi. Hetta arbeiðið eigur at lúka nakrar grundleggjandi treytir:

- Arbeiðið eigur at vera grundfest í politisku skipanini í kommununi (í kommunuráðnum og nevndum).
- Ábyrgdin fyri arbeiðnum við burðardyggari menning eigur at vera bundin at kommunalu umsitingini.
- Lokal áhugafeløg og borgarar eiga at verða inndrigin.

**Meginreglur fyri arbeiðið**
Dentur verður lagdur á tríggjar meginreglur, sum eiga at verða fylgdar fyri at arbeiðið við burðardyggari menning í einari kommunu skal eydnast.

- Ítøkilig innsatsøkir verða vald út at arbeiða við
- Innsatsøkini verða væl lýst, langskygd mál verða sett, og arbeitt verður við ítøkiligum verkætlanum á hvørjum øki sær
- Ábyrgdarar verða settir fyri hvørja verkætlan sær, og áramál verður sett á, nær ymisku verkætlanirnar skulu verða lidnar

**Soleiðis verður komið á mál**
Í minnu og miðalstóru føroysku kommununum eru umsitingarnar ofta lítlar. Fáar ella bert ein umsitingarlig deild er. Og talið av starvsettum hjá kommununi er lágt. Hetta nýtist tó í sjálvum sær ikki at vera ein forðing. Verða realistisk mál sett og arbeitt málrættað, ber til at koma langt.

Til at náa á mál kann hesin bóklingurin nýtast sum vegleiðing. Bóklingurin er ein ítøkilig uppskrift uppá hvussu arbeiðið fyri burðardygga menning í eini kommunu kann setast í gongd.

Eisini ber til at nýta bóklingin sum kveiking í arbeiðinum fyri burðardygga menning í kommununum annars.

**Kommunan skal binda seg sjálva**
Tey átøk, sum verða nevnd í ætlanini, hava kommunan saman við øðrum ábyrgdarum bundið seg til at gera og at seta pening og tíð av til at fullføra.

Leisturin leggur upp til, at kommunustýrið velur ítøkilig innsatsøkir út og setir síðan ein arbeiðsbólk at gera uppskot til eina ætlan fyri burðardygga menning í kommununi.

Hettar uppskotið verður síðani lagt fram fyri kommunustýrið og fyri borgaran á borgarafundi til hoyringar. Uppskotið verður síðan rættað til og endaliga góðkent av kommunustýrinum.

At enda verður ætlanin prentað í einum faldara, ið verður sendur í hvørt hús í kommununi ella lagdur út á heimasíðuna hjá kommununi.

Góðan lesi- og arbeiðshug!



# Arbeiðsætlan

**Hvussu verður arbeitt við leistinum? Uppskot til raðfylgju.**

- Kommunustýrið finnur og raðfestir innsatsøki í kommununi. Sí síðu 7
- Ein arbeiðsbólkur verður settur at orða ætlan fyri innsatsøkini
- Arbeiðsbólkurin arbeiðir við ymsu innsatsøkjunum
- Orðað verður ein fyribils ætlan. Hon verður síðani løgd fyri kommunustýrisfund
- Fyribils ætlanin verður løgd fram á borgarafundi og løgd út til hoyringar hjá borgarunum. Hetta kann m.a. gerast á heimasíðuni hjá kommununi
- Arbeiðsbólkurin tillagar ætlanina við teimum broytingar-uppskotum, sum borgarar og kommunustýrið eru komin við
- Ætlanin verður endaliga góðkend av kommunustýrinum
- Rættlestur
- Uppseting
- Prenting

# Uppskot til innsatsøki

- Drekkivatn
- Kloakk / Spillivatn
- Óljóð og luftdálking
- Mentanarminnir
- Umhvørvisundirvísing
- Dálking av náttúruni
- Planleggingarmál
- Burturkast / Renovatión
- Skaðadjóraoyðing
- Orkunýtsla
- Náttúru- og skógrøkt
- Kommunal innkeyp
- Trivnaður
- Kunning til borgaran
- Stovnan av lokalum Agenda 21 felag





# Arbeiðsbólkurin

**Kommunan setir arbeiðsbólkin og orðar arbeiðssetning, ið arbeiðsbólkurin skal arbeiða eftir.**

Arbeiðsbólkurin verður settur av borgarstjóranum ella kommunustýrinum. Bert 3-5 limir eru í bólkinum, soleiðis at bólkurin kann arbeiða skjótt og effektivt. Hesir kunnu vera:

- Skrivari (settur av kommununi)
- Limir úr kommununi (kommunustýrislimur og/ella starvsfólk)
- Lokalt fakfólk / heimildarfólk
- Áhugaður borgari
- Evt. onnur

Av tí at arbeiðsbólkurin skal verða skjóttarbeiðandi, verður miðað ímóti at hava fund hvønn mánað. Miðað verður ímóti at bólkurin samanlagt heldur 5-8 fundir. Kommunan ávísir hóskandi høli við framløguhentleikum, har bólkurin kann halda fundir.

Arbeiðið í bólkinum verður framt á fundunum. Eyka arbeiðsuppgávur verða býttar út á limirnar millum fundirnar. Skrivarin tekur sær av tí mesta skriviarbeiðinum og tekur sær harumframt av at samskipa arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum.

Um tað verður mett neyðugt, kann Agenda 21 Stovan luttaka sum prosessvegleiðari á fyrstu fundunum. Harumframt er Agenda 21 Stovan eisini altíð til reiðar at veita ráð.

## Arbeiðsleistur, arbeiðsbólkur

Arbeiðsbólkurin arbeiðir við hvørjum av útvaldu innsatsøkjunum út frá hesum leisti.

**Grundarlag fyri arbeiðnum**
Arbeiðsgrundarlagið á innsatsøkjunum verður lýst og greinað:

- Hvussu er støðan á økinum í dag
- Hvussu er lógargrundarlagið og ábyrgdarbýtið á økinum, t.d. millum land og kommunur

**Ætlan og mál**
Mál fyri framtíðina hjá ymisku innsatsøkjunum verða orðað. Fyri hvørt mál sær verða ítøkiligar ætlanir fyri at náa málunum lýstar:

- Tiltøk verða eyðmerkt
- Ítøkilig áramálsætlan verður løgd
- Kostnaðarmeting av tiltøkum verður gjørd
- Ábyrgdarar og samstarvspartnarar verða eyðmerktir. Hetta kann bæði vera fólk í kommunalu umsitingini, lokalir áhugafelagsskapir, stovnar ella onnur
- Møguleikar og vansar á økinum verða greinaðar
- Avgjørt verður nær og hvussu eftirmeting av tiltøkunum skal fara fram

# Útgávutekstur

Ein møguleiki er at prenta ein bókling við útgávutekstinum og senda hann í hvørt hús í kommununi og/ella at leggja útgávutekstin út á heimasíðuna hjá kommununi.

**Bygnaður av útgávutekstinum**
Útgávuteksturin kann vera býttur upp í ein felagspart og síðani ein part fyri hvørt av innsatsøkjunum.

Felagsparturin kann innhalda:

- Innleiðing (evt. skriva av borgarstjóranum)
- Stutta lýsing av kommununi og umhvørvinum í kommununi

Kapitlini um innsatsøkini hjá kommununi verða uppbygd soleiðis:

- Støðan í dag á økinum
- Mál fyri økið frameftir
- Ítøkiligar verkætlanir á økinum verða nevndar og áramál sett á nær tær skulu verða lidnar
- Ábyrgdarar fyri hvørja verkætlan sær verða nevndir

**Betur stutt og greitt**
Útgávuteksturin eigur ikki at fylla ov nógv. Viðgerðin av hvørjum innsatsøki eigur ikki at fylla meir enn eina opnu (2 síður). Innleiðingin eigur at fylla eina síðu og lýsingin av kommununi 2-3 síður.

Við sigandi myndum ber til at fríðka um útgávuna og harvið gera hana meira lesivinarliga.

Kort og annað bakgrundstilfar (t.d. lógir, kunngerðir o.a.) eigur ikki við í útgávuna, men kann vera til taks á kommunuskrivstovuni og á heimasíðuni hjá kommununi.



## Fundir, uppskot til tíðarætlan

| | |
|---|---|
| 1. fundur | Orðan av arbeiðssetningi og setan av arbeiðsbólki (kommunan / kommunustýrið) |
| 2.–5. fundur | Arbeiðsbólkurin arbeiðir við at orða uppskot til ætlan fyri ymsu innsatsøkini |
| 6. fundur | Fyribilsuppskot løgd fyri kommunustýrið |
| 7. fundur | Framløga av uppskoti á borgarafundi |
| 8. fundur | Evt. revidering av uppskoti |

# Agenda 21 og lokalsamfelagið

Á felags fundi í Rio í 1992 undirskrivaðu 180 av heimsins londum undir sokallaða Rio-sáttmálan. Longu í áttatiárunum var greitt, at menningin í okkara nýmótans samfelagi ikki er burðardygg í longdini. Útlátið og tilfeingisnýtslan í heimsins londum førir við sær, at jørð, hav og luft verða dálkað, at náttúrugivna tilfeingið verður oytt og at lívfrøðiliga margfeldið minkar.

Við Rio-sáttmálanum bundu londini seg tí til at gera okkurt við hendan trupulleika og at arbeiða samfelt fram ímóti einari burðardyggari samfelagsmenning. Aðalmálið var at leggja lunnar undir eina burðardygga menning nú, sum ikki minkar um møguleikarnar hjá komandi ættarliðum at menna seg.

Á Rio-fundinum varð orðað ein ætlan fyri eina burðardygga menning í heiminum í 21. øld. Heitið á hesari ætlan gjørdist Agenda 21 ella Dagsskrá fyri burðardyggari menning í 21. øld.

Ein týdnarmikil partur av Agenda 21 ætlanini er nevndur Lokal Agenda 21. Undir hesum partinum binda myndugleikar á staðnum, felagsskapir og einstaklingar seg til at arbeiða fyri einari burðardyggari menning í júst teirra økið ella bygd. Í løtuni arbeiða meira enn 6000 heimasamfeløg kring heimin við hesum, og fleiri koma aftrat.

Slagorðið fyri arbeiðið hjá samfeløgunum á staðnum er: **Hugsa globalt, handla lokalt.** Málið er at gera eitt munadygt arbeiðið fyri burðardyggari menning og vøkstri í samfelagnum á staðnum og samstundis gera mun at betra um alheims umhvørvið.

**Agenda 21 Stovan**

Agenda 21 Stovan, Frammi í Gerði 1, 340 Kvívík
tel 59 07 66, www.fkf.fo, agenda@fkf.fo